## Maður illa skorin

Illstøða millum tveir menn á Tvøroyri leygarnáttina endaði við, at annar dró knívin. Klokkan seks í morgun fekk løgreglan í Suðuroy boð um, at ein maður hevði brúkt knív á Tvøroyri, og at hann hevði skorið ein annan mann í andlitið og í vinstra lærið. Maðurin, sum var skorin, bleiv fluttur á Suðuroyar Sjúkrahús, har sárini vórðu seymað. Sommer Joensen, sýslumaður á Tvøroyri, sigur við Portalin, at maðurin var ógvusliga skorin, men at talan tó ikki var um lívshættisligar skurðir. Maðurin, sum hevði brúkt knív, bleiv tikin og fluttur til Havnar. Hann kemur til grundlógaravhoyring í morgin, og tá fer løgreglan at krevja, at hann verður varðhaldsfongslaður.

## Varðhaldsfongslaður fyri at brúka knív

Maðurin, sum brúkti knív á Tvøroyri leygarnáttina, skal sita í varðhaldinum hendan mánaðin út. Maðurin, sum er miðskeiðis í 40-árunum, var til grundlógaravhoyring í Føroya Rætti fyrrapartin sunnudagin, og har varð avgjørt, at hann skal sita í varðhaldi til tann 31. august, meðan málið verður kannað. Hann er skuldsettur fyri grovan harðskap eftir grein 245 í revsilógini.

Formaðurin í Havbúnaðarfelagnum:

# - Eingin grund til panikk



*- Oljan kann elva til, at nakað kemur í smakkin ta fyrstu tíðina, tá sjógvurin er dálkaður, men laksurin hevur góðar eginleikar at niðurbróta tey evnir, sum eru í oljuni – serliga gassoljuni, sigur formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag, Ragnar Joensen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag, Ragnar Joensen, stúrir ikki fyri alifiskinum, nú olja frá Olshanu hevur rakt trý alibrúk í Sundalagnum. – Sum er, er eingin vandi á ferð, og vit taka hetta ógvuliga easy, sigur hann**

OLSHANA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ragnar Joensen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelag og stjóri í Pan Fish í Føroyum, stúrir ikki fyri alifiskinum, nú olja í vikuskiftinum lak úr russiska trolaranum Olshanu og rak norður í Sundalagið og inn á Skálafjørðin.

- Sjálvandi hava vit tosað um støðuna, og vit hava hildið neyvt eyguni við gongdini. Olja er rikin fram við trimum alibrúkum í Sundalagnum – einum við Kolbanagjógv, einum við Selatrað og einum við Veðranes.

### Einki deytt

Ragnar Joensen sigur, at alarar taka støðuna ógvuliga “easy”, sum hann tekur til.

- Eingin fiskur er deyður, og vit eru farnir aftur at fóðra.

Hann sigur, at fiskurin faktiskt ikki hevur verið dálkaður.

- Fiskurin er kannaður, og tað hevur eingin munur verið at sæð á fiskinum – nú og fyri oljudálkingina, sigur Ragnar.

Formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag vísir á, at alifiskur er ikki so viðbrekin, sum onkur kanska kundi hildið – og slett ikki, tá talan er um gassolju.

### Góðar eginleikar

- Oljan kann merkja, at nakað kemur í smakkin ta fyrstu tíðina, tá sjógvurin er dálkaður, men laksurin hevur góðar eginleikar at niðurbróta tey evnir, sum eru í oljuni

Ragnar Joensen sigur, at dálkingin, sum verið hevur av oljuni higartil, hevur verið so lítil, at hetta ikki hevur sett seg í smakkin.

- Nei, her er eingin grund til panikk, soleiðis sum støðan er í løtuni, sigur formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag.

### Einki er galið

Tað er Pan Fish, sum eigur alibrúkið undir Veðranesi, North Salmon á Selatrað og Vestlaks í Kolbanagjógv.

- Vit hava sum nevnt sent fisk til kanningar, og hetta er mest fyri at staðfesta, at einki er galið, sigur Ragnar Joensen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelag.

Eftir skipsbrotið við Olshanu:

# Bjørn Kalsø biðið um frágreiðing

**- Eg havi fylgt við málinum og vil nú hava at vita, hvørjar avgerðir eru tiknar, og hvat hesar eru grundaðar á, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður**

OLSHANA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í dag fær landsstýrismaðurin, Bjørn Kalsø, eina frágreiðing um Olshanu-málið og tær avgerðir, sum eitt nú Tilbúgvingarstovnurin hevur tikið í hesum sambandi.

Landsstýrismaðurin hevur fylgt væl við gongdini, men hevur ikki hug at gera viðmerkingar til málið, fyrr enn hann hevur fingið eina frágreiðing frá teimum pørtum, sum hava havt málið um hendi.

### Eftirmeting

- Jú, eg havi fylgt væl við, og í dag fái eg so eina frágreiðing frá eitt nú Tilbúgvingarstovninum um gongdina, tær avgerðir, sum tiknar eru – og hvat hesar avgerðir eru grundaðar á.

Hann sigur, at hetta er ein fundur, sum hann setti sær fyri at hava, so skjótt tað var greitt, at vit stóðu yvirfyri einum skipsbroti.

Eftirfylgjandi eftirmetingar verða eisini gjørdar, og fyrr enn landsstýrismaðurin hevur havt fundir við partarnar, sum hava luttikið í bjarging og tilbúgving annars, dugir hann ikki at meta um, hvørt skipsbrotið og oljudálkingin, sum stóðst av hesum, geva grundarlag fyri nøkrum sum helst.

### Ikki tað fyrsta

Vit spurdu Bjørn Kalsø, um hugsandi er, at nøkur átala verður givin – ella um í ringasta føri høvd fara at “rulla” fyri handfaringina av skipsbrotinum:

- Nei, hetta er ikki tað fyrsta, eg hugsi um. Tað, sum í fyrsta lagi hevur mín áhuga, er tær avgerðir, sum tiknar eru, og hvat hesar byggja á, sigur Bjørn Kalsø, sum væntandi veit meira at siga um málið eftir fundin í dag.



*Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, segði seg í morgun ikki duga at meta um handfaringina av skipsbrotinum við Olshanu. – Í dag fái eg eina frágreiðing frá teimum, sum hava verið partar í hesum máli, sigur hann*